## S lán frá Suðuroyar Sparikassa

Fríggjadagin kemur Suðuroyar Sparikassi við einum nýggjum tilboð, tey nevna S-lán. Suðuroyar Sparikassi hevur kallað til tíðindafundar í Havn um hetta lánið, uttan tó at siga nevyt, hvussu hetta lánið er samansett. Men tað snýr seg um at læna pengar frá sær sjálvum fyri 1,5% í rentu. Tað var Suðuroyar Sparikassi sum setti hol á rentulækkingina fyri nøkrum árum síðani við sokallaðu DJ-lánunum, har fólk kunnu fáa avdráttarskáa ávísar mánaðir.




# Hendiligt arbeiðsóhapp í Kollafirði

**Ein arbeiðsmaður, sum var í Kollafirði við klori til Vestlaks í gjár, var so óheppin, at platturin koppaði, tá hann skuldi taka tann stóra og tunga klordunkin av vørubilinum. Maðurin slapp við skaðum í andlitinum og nøkrum brotnum tonnum**

ARBEIÐSSKAÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin var ein maður fyri arbeiðsskaða á bryggjuni í Kollafirði.

Hann var komin við einum vørubili og skuldi seta ein platt av við einum 1000-1200 litra stórum klordunki, sum Vestlaks skuldi brúka.

Hendingin fór fram, tá hann var í holt við at lossa plattin við dunkinum av vørubilinum. Platturin koppaði og fólk, sum vóru á staðnum, stúrdu í fyrstuni fyri, at maðurin hevði fingið plattin omanyvir seg.

Boð vórðu send eftir løgreglu og sjúkrabili, sum flutti arbeiðsmannin á Landssjúkrahúsið.

Maðurin hevði fingið snuddir í andlitið, og hann hevði eisini brotið nakrar tenn. Hann var uttan vit eina løtu, men sum skilst, hevur hann ikki fingið varandi mein av tilburðinum.

### Hendiligt óhapp

Arbeiðseftirlitið sendi tvey fólk til Kollafjarðar at kanna málið, men tá var maðurin longu fluttur á Landssjúkrahúsið.

Símun Hammer á Arbeiðseftirlitinum sigur, at maðurin tíbetur er sloppin væl frá hendingini.

- Eg dugi ikki at síggja, at nøkur mistøk eru gjørd. Hetta er meira ein hending, sum stóðst av, at maðurin, sum skuldi taka plattin við stóra og tunga klordunkinum av vørubilinum, hevði ov lítlar royndir við júst hesum arbeiði og amboðunum, hann brúkti.

Símun Hammer heldur ikki, at nakar verður ábyrgdaður fyri hendingina í Kollafirði, sum eftir umstøðunum spældi rímiliga væl av.

Tað var Tórshavnar Sløkkilið, ið tók sær av at rudda stóra klordunkin burtur.

- Hetta eru sterkir dunkar, og tí kom lítið av klori á bryggjuna undir hendingini, sigur Símun Hammer á Arbeiðseftirlitinum.



*Soleiðis sóu umstøðurnar út, tá Arbeiðseftirlitið kom á staðið í gjár. Í fyrstani hildu fólk, at maðurin var komin at liggja undir hesum tunga klordunkinum, men tíbetur vísti tað seg, at hann ikki hevði fingið varandi mein*
*Myndir: Arbeiðseftirlitið*

# Ein undirhaldandi og spennandi vika

RUNAVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Aftur í heyst verður skipað fyri vinnustevnuni FaroExpo og Mentanarviku í Runavíkar kommunu.

Hetta er soleiðis triðja árið á ráð, at hesi tiltøk verða hildin í kommununi.

Fysiski karmurin um vinnustevnuna, sum verður í døgunum 29. oktober til 1. november, er Ítróttarhøllin í Runavík. Sjálvur ráðstevnuparturin við fyrilestrum verður hildin í Kelduni í Skálafirði.

Mentanarligu tiltøkini, sum verða í kommununi í døgunum 28. oktober til 4. november, verða av ymiskum slagi og á ymiskum støðum kring um í Runavíkarøkinum.

Í Runavíkar kommunu siga tey, at talan verður um eina undirhaldandi og spennandi viku, bæði hjá almenninginum og hjá teimum fyritøkum, sum luttaka á Faroexpo.

- Hetta verður ein rættur blandingur av mentanarligum undirhaldi og fakligum innihaldi.

FaroExpo og Mentanarvikan tilsamans er eitt rættiliga stórt tiltak.

- Vinnustevnan vendir sær til føroyskar og útlendskar vinnufyritøkur og feløg, ið fáast við – ella ætla sær í holt við – útflutning og møguligt samstarv innan útflutning.

Tey, sum standa aftanfyri tiltøkini, siga, at FaroExpo er eitt gott høvi hjá føroyskum fyritøkum at hittast og byrja samstarv, sum kann økja um teirra møguleikar á heimliga og altjóða marknaðinum.

Vinnustevnan verður eins og undanfarin ár skipað sum sonevnd "partnariat" í Ítróttarhøllini í Runavík.

- Mannagongdin fyri slíka skipan er, at luttakararnir – áðrenn stevnan byrjar – hava ynskt at hitta aðrar luttakarar á skipaðum fundum, sum verða hildnir innanfyri eitt avmarkað tíðarskeið á einum steynubási.

Á FaroExpo verður eisini skipað fyri eini røð av fyrilestrum, og hesir eru almennir.

Tað er sum nevnt Ítróttarhøllin í Runavík, ið verður fysiski karmurin um sjálvan vinnustevnupartin, meðan Keldan í Skálafirði eins og undanfarin ár verður karmurin um ráðstevnupartin.

Virkisráðgevingin í Saltangará er høvuðssamskipari av FaroExpo og Mentanarvikuni, og hetta verður gjørt í samstarvi við Kunningarstovuna í Saltangará og Runavíkar kommunu.